

# Silvalandið

**Summar Festivalurin bjóðar øllum sínum yngru gestum vælkomnar í eitt spennandi Silvaland at uppliva tónleik, undirhald, gullgraving, túnabólt, forðabreyt, spælipláss, andlitsmálin, hoppiborgir og annað**

Silvalandið er enn størri í ár, og hesaferð verður útfyllingin á sandinum, fjøran og sjógvurin týðandi partur av teimum nógvu tilboðunum hjá spæligladum festivalgestum. Møguleiki verður at rógva í smáum hugnaligum jollum framvið landinum og eisini er vatnítróttur og skjóttgangandi speedbátur er á vágni, sum børn og vaksin kunnu royna.

Stórt Tipi-tjald er á Sandinum, har møguleiki er at keypa mat frá kokkinum, sum fer at grilla inni í hugtakandi indianaratjaldinum.

## Hósdagur 6. august

**18.00** Silvalandið letur upp: Hoppuborgir, undirhald, gullgraving, andlitsmáling og mangt annað.
**19.00** Listakvinnan Armgarð Absalonsen byrjar at mála stóran málning á Silvalandinum. Hon arbeiðir við listarverkinum allar festivaldagarnar og verður liðug leygardagin.
**19.15** Trølla-show á Stóra palli á Vágsbøi
**19.30** Fimleikarar framføra saman við dansigentum og break-dansarum
**20.00** ABBA karaoke – øll kunnu royna seg sum stjørnur á palli
**23.00** Silvandið letur aftur

## Fríggjadagur 7. august

**14.00** Silvalandið letur upp: Hoppiborgir, gullgraving, andlitsmáling og mangt annað.
**15.00** Túnafótbóltur. (3 leikarar á hvørjum liði. Avmarkað luttøka.
Tilmelding á telefon: 256078, seinast hóskvøldið kl. 21.00)
**16.00** Andlitsmáling – øll kunnu blíva mála, men vit byrja við, at kend andlit blíva mála
**18.00** Fimleikarar framføra saman við dansigentum og break-dansarum
**18.30** Gyklarar undirhalda
**19.00** Rógvi Jakobsen spælir
**20.45** Barnakonsert
**23.00** Silvandið letur aftur

## Leygardagur 8. august

**11.00** Skattajakt – børn í aldrinum 5-8 ár kunnu luttaka: (tilmelding og gjald fer fram í Tipitjaldinum á Sandinum - avmarkað luttøka)
**13.00** Skattajakt – børn í aldrinum 9-14 ár kunnu luttaka. (tilmelding og gjald fer fram í Tipitjaldinum á Sandinum - avmarkað luttøka)
**14.00** Silvalandið letur upp: Hoppiborgir, gullgraving, andlitsmáling og mangt annað.
**14.15** Niels Midjord & Lív Næs framføra løg av nýggju fløguni
**15.00** Andlitsmáling. Paliette, kanska besti andlitsmálari í Europa, vitjar
**15.30** Gyklarar framføra
**18.00** TNT spælir
**20.15** Barnakonsert
**00.00** Silvandið letur aftur

### Hvør hevur atgongd til Silvalandið?

Øll, ið hava keypt atgongumerki til Summar Festivalin 2009, hava atgongd til tiltøkini, tilboðini og møguleikarnar, sum Silvalandið 2009 bjóðar.

### Kamping & spælipláss

Á økinum Við Sandin verður stórt kampingøki, har húsvognar fara at búleikast. Umframt gistingina á Sandinum eru góðir møguleikar hjá børnunum at spæla, tí spælipláss verður eisini gjørt á økinum Við Sandin, soleiðis at børnini í kunnu spæla beint við búøki.

### Skattajakt

Leygardagin verður skattajakt. Bussur koyrir frá Tipi-tjaldinum á Sandinum og setir børnini av aftur har, tá ið skattajaktin er liðugu. Skattajaktin varar umleið 70 minuttir. Í sambandi við tilmeldingina verður navn á barninum skrivað niður, samstundis sum tað fær útflýggjað ein vest við tali á. Eisini verður nøvn og telefonnummur hjá foreldrum ella verja skrivað niður. Luttøkan í skattajaktini er avmarkað, og tí er neyðugt at tekna til í góðari tíð.

### Fótbóltur

Stóri fótbóltsvøllurin við Djúpumýri liggur beint aftan fyri Flagstjaldið.

### Svimjing

Klaksvíkar Svimjihøll hevur opið fríggjadagin millum 13-20. Og leygardag millum 10-17.